# Stjóri til TRYGD




## Vit leita eftir stjóra, ið miðvíst og við umhugsni kann leiða felagið enn longri fram á leið.

Trygd er eitt nýmótans tryggingarfelag, ið kann bjóða nærum øll sløg av skaðatryggingum innan privattryggingar, vinnutryggingar og sjóvátryggingar.

Trygd varð stovnað í 1932. Føroya Banki eigur allan partapeningin í felagnum. Trygd er eitt fíggjarliga sterkt felag, sum í 2006 hevði tryggingargjøld á 72 mió. kr. Við ársenda 2006 var eginognin 97 mió. kr. Felagið hevur um 30 dugnalig starvsfólk knýtt at sær.

Trygd hevur havt vaksandi úrslit seinastu árini, og vit vilja framhaldandi økja um hesi.

**Starvið krevur,** at tú brennir fyri at skapa vøkstur og úrslit. Somuleiðis hevur tú evnini til strategiska leiðslu, umframt tað at leiða starvsfólk.

**Tú hevur** hægri útbúgving frá góðkendum lærustovni ella samsvarandi royndir at stjórna eini fyritøku. Kunnleiki til tryggingarvirksemi er fyrimunur, men tó eingin treyt.

**Sum persónur** sýnir tú opinleika, treysti og ein kveikjandi hugburð. Tú dugir at samráðast og vegleiða og finnur íblástur frá innihaldinum í starvinum, ið er ein samanseting av rakstrarligari ábyrgd og menning av felagnum. Tú sýnir eisini fjølbroytni, tá tað snýr seg um menniskjaligar relatiónir.

**Sum stjóri** hevur tú beinleiðis ábyrgd av dagliga rakstrinum av felagnum og skalt tryggja framhaldandi menningina. Tú verður berandi megin í felagnum og gevur í dagliga yrkinum íblástur til viðskiftafólk, starvsfólk og eigara.

**Setanarviðurskiftini** verða avtalað millum teg og nevndina í felagnum.

**Send umsókn tína** við CV til: Janus Petersen, nevndarformann, c/o Føroya Banki, Húsagøta 3, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn.

**Meiri fæst at vita** við at seta seg í samband við Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara, á tel. 330 330 ella á bm@foroya.fo.

UMSÓKNARFREISTIN ER 24. SEPTEMBER 2007

TRYGD leitar eftir tær.

REPROZ

MARKNAÐARRÁK

VIKA 37 2007

### PARTABRØVINI FYRI BAKKASTI

Sum vit í seinastuni hava víst á, kunnu sveiggj væntast á partabrævamarknaðunum. Tað er ov tíðliga at siga at fíggjarófriðurin er avhasaður. Tað gekk sjón fyri søgn fríggjadagin, tí hóast Evropiski miðbankin ikki hækkaði rentuna í farnu viku, so lækkaðu alheims partabrøv nógv hendan dagin. Evropiska partabrøv lækkaðu 2%% og er tað 4,5% tilsamans í farnu viku. Orsøkin var at størvini á amerikanska arbeiðsmarknaðaðinum fækkaðust fyri fyrstu ferð í 4 ár.

### ATLANTIC PETROLEUM FUNNIÐ OLJU

Mánamorgunun var kunngjørt at felagið hevði rakt við týðandi nøgdir av kolvetni tá teir boraðu ein avmarkingarbrunn eystanfyri Írland. Hetta fekk kursin á partabrævinum at hækka 12% í 1189. Eftirsum olja frammanundan var staðfest í leitiloyvinum, økti hetta ikki virðið á felagnum eins nógv sum varð ein leitibrunnur boraður. Næstu vikurnar fer felagið at royndarframleiða. Gongst eftir vild eru sannlíkindini fyri endaligari framleiðslu økt nakað aftrat. Kaupthing metir, at kurshækkingin svarar áleið til mettu virðisøkingina.

### DOLLARIN Á SÍNUM LÆGSTA

Vánaligu arbeiðsmarknaðartølini fingu dollaran at lækka niður í 5,39 sum er tætt við tað lægsta hann hevur verið síðan 1995. Veiki dollarin speglar væntanirnar hjá íleggjarum um, at amerikanski tjóðbankin skjótt fer at lækka rentuna.

### RENTURNAR ÓBROYTTAR

Lánsbrævarentur lækkaðu av sonnum í farnu viku. Eisini her var tað veiki amerikanski arbeiðsmarknaðurin, sum gjørdi munin. 10-ára rentan liggur á 4,24% í mun til 4,36% fyri viku síðan.

### HESA VIKUNA

Mest áhugaverdu lyklatølini hesa vikuna, sum kunnu ávirka marknaðirnar, eru amerikanska brúkaraálitið og uppgerðin um smásøluna. Partabrævamarknaðirnir fara væntandi at halda á at sveiggja hesa vikuna.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1380,62 | -1,34% |
| Alheims partabrøv | 8277,72 | -1,95% |
| Atlantic Petroleum | 1189,00 | + 7,31% |
| Føroya Banki | 218,50 | -7,02% |
| Eik Banki | 668,00 | -3,61% |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,08 | -0,83% |
| USD | 539,57 | -1,31% |
| JPY | 4,74 | + 0,8% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo**

KAUPTHING BANK